# Flogvøllurin eigur at verða roykfríur




*Flogvøllurin átti at verið púra roykfríur, heldur Erik Biskopstø*

**– Tað er órógvandi fyri ferðafólk, sum ikki roykja, at tað er so nógvur roykur á flogvøllinum í Vágum. Flogvøllurin átti at verið púra roykfríur, sigur eitt av ferðafólkunum, sum hóskvøldið bíðaði eftir seinkaðum flogfari í Vágum**

ROYKING
*Eyðun Klakkstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Strangt roykiforboð verður vanliga knýtt at flogferðslu – í øllum førum tá ið flogførini eru á flogi – men á flogvøllinum í Vágum ber til at fáa sær ein guv í cafeteria-økinum. Í einum parti á kaffistovuni ber til at festa sær í og blása tubbaksroykin út í luftina.

– Tað skuldi verið fullkomiligt bann fyri royking á flogvøllinum. Nógv fólk sita vanliga og bíða eftir flogfarinum, og tað kann ikki verða rætt, at tey skulu sita í royki og bíða. At royking bert er loyvd í einum parti av kaffistovuni hjálpir lítið, tí roykurin fer allastaðni, sigur Erik Biskopstø, sum hóskvøldið bíðaði fleiri tímar eftir flogfari, ið ikki fekk sett seg í Vágum orsaka av mjørka.

– Alt fleiri fólk ferðast, og bíðitíð er vanlig á einum hvørjum flogvølli. Tí eiga fólk ikki at útsetast fyri royki á einum slíkum staði. Vit hava ein almennan roykipolitikk í Føroyum, og flogvøllurin átti eisini at tikið stigið og blivið roykfríur, sigur Erik Biskopstø.

– Tað er kanska væl skiljandi, at fólk, sum sita leingi og bíða, vilja hava eina sigarett, og tí kundi verið hóskandi við serstøkum roykirúmi á flogvøllinum, sigur hann.




## SPENNANDI STARV Í KAUPTHING

Nú vit av álvara fara undir bankavirksemi í næstum, sóknast vit eftir fólki til umsitingardeild okkara.

Tú vísir beinleiðis til leiðaran á umsitingardeildini og kemur at fáast við bókhald. Tú umsitur láni-skjøl, handfer skjalagongdina í sambandi við virðisbrævahandlar og tekur tær av øðrum fyrifallandi uppgávum.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og hevur eitt positivt lyndi. Vit leggja stóran dent á, at okkara starvsfólk eru útvend og løtt at samstarva við.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einum livandi felagi, sum støðugt mennist. Millum starvsfólkini valdar ein góður samstarvsandi í einum spennandi og mennandi umhvørvi.

Hevur tú okkurt at spyrja um, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum á telefon 351500 ella Regin I. Jakobsen, umsitingarstjóra á telefon 351510 / 551510 ella teldupost regin@kaupthing.fo.

Umsóknir skulu í seinasta lagi 23. juni 2006 sendast til:
Kaupthing, Bókbindaragøta 8
Postboks 3090, 110 Tórshavn

sansir.fo

www.kaupthing.fo

KAUPTHING


# Teitur heldur fast í ovastu rók

**Teitur tykist at hava bitið seg fastan í ovastu rók á 15 teimum bestu, hvørki finsk trøll ella rokk gudar úr Kalifornia megna at taka Louis Louis aftur**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hóast hann er undir hørðum trýsti frá Lordi og lagnum Hard Rock Halleluja, so er Teitur eisini hesa vikuna ovast á 15 teimum bestu. Fimtu viku á rað liggur fyrsta stakfløgan hjá Teiti Louis Louis ovast á føroyska hitlistanum hjá Útvarpi Føroya.

Lagið, ið hevur fingið Tom Petty at leggja sak móti Red Hot Chili Peppers "Dani California" liggur á triðja plássi framman fyri Just Dig hjá Høgna Lisberg, ið 12. viku á rað liggur ovarliga á listanum. Eitt greitt tekin um, at Høgni Lisberg er vorðin eitt tað best umtókta navnið á føroyska tónleikapallinum. Høgni hevur næstan alt árið havt okkurt lag í ovara enda á 15 teimum bestu. M.a. nógvar vikur á ovastu rók við fyrst Learn To Ride On Waves og síðan Just Dig.

Á fimta plássi liggur Summar Festival aktuelli The Rasmus við lagnum Sail Away. Umframt Teit og Høgna eru tvey onnur føroysk løg á listanum. Dancing Around Honolulu hjá The Story Ends livir eina skiftandi tilveru á listanum. Eina viku lá lagið ovast, síðan hevur tað flutt seg aftur og fram, inntil tað í seinastu viku sá út til at vera á veg av listanum á 13. plássi. Hetta aftan á einans 6 vikur inni í hitanum. Hesa vikuna er lagið fari eitt vet upp, og liggur á 10. plássi.

Síðsta føroyska lagið á listanum er dance útgávan av Páll Finnur Páll lagnum Rasputin. Tað er High Hat saman við Heiðriki á Heygum, ið hevur staðið fyri endurgerðini av lagnum, Rasputin krýpur upp av 15. til 14. pláss.

Eitt føroyskt eyka lag roynir seg eisini hesa vikuna.



*Eingin megnar at skumpa Teit av ovastu rók á 15 teimum bestu*

Tað er endurgerðin hjá Side Effect av gamla MC-Hár lagnum Murder #1, ið nú sleppir at royna seg. Lagið var eisini inni á 15 teimum bestu í upprunaútgávuni í 1999.

Tað er áhugavert, at endurgerðir av føroyskum løgum tykjast at gerast alsamt betur umtóktar. Í fjør var tað Nalja lagið Sjeikurin, ið gjørdi um seg. Nú eru tað Rasputin og Murder #1 og um eina góða viku, gevur The Dreams eina heila fløgu út við endurinnspældum føroyskum hittum.